# Rosie á Býarbókasavninum mentanarnáttina




Rosie Swale Pope sigur frá síni spennandi ferð. Hon hevur runnið kring knøttin, og Føroyar eru síðsti steðgur, áðrenn hon fer við Norrønu til Scrabster og rennur seinasta teinin heim til Wales. Hoyr Rosie fortelja um, hvussu man vaskar hárið, tá tað er so kalt, at vatnið frystir, áðrenn tú hevur skolað sápuna úr aftur, um ta ferðina hon møtti einum naknum manni við revolvara ella um úlvarnar, sum runnu við henni í Sibiria. Aftaná kunnu áhoyrararnir práta við Rosie og spyrja spurningar, og Rosie sýnir fram vognin og ymiska útgerð, sum hon hevur við sær á ferðini. Mentanarnáttin 6. juni kl. 16 á Býarbókasavninum. Tiltakið er á enskum, tað er ókeypis, og øll eru vælkomin. Rosie gleðir seg til at hitta føroyingar, tí hon er sera bergtikin av landi okkara. Heimasíðan hjá Rosie rosiearoundtheworld.co.uk
Grein á Portal.fo www.portal.fo/index.php?lg=50586




















